## Bitland roynir samstarv um nýggja virkisskrá

**Tað hevur í nógv ár verið ein trupulleiki, at eingin felags virkisskrá hevur verið í Føroyum. Tí skipar Bitland saman við Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum fyri BitStovu (verkstovu) um nýggja felags virkisskrá**

VIRKISSKRÁ
*Tíðindaskriv*

Upplýsingar um føroysk virkir verða í dag innsavnað av ymsum stovnum og privatum fyritøkum, sum eftir førimuni hava skipanir, sum nøkta teirra tørv. Eingin ella lítil samskipan er av hesi innsavnan, og trupult er at samskifta og endurnýta somu upplýsingar millum stovnar. Ynski er um at betra innsavnanina, dagføring og nýtsluna av teim upplýsingum, sum viðvíkja einstøku virkjunum og sum tað almenna og ávísir privatar stovnar hava tørv á.

Endamálið við hesi BitStovuni er at semjast um ein arbeiðsleist í samband við at menna eina felags virkisskrá, sum allir áhugabólkar kunnu brúka eftir tørvi. Fyri at koma hesum máli nærri er neyðugt at viðgera avbjóðingarnar og útvega boð uppá hvussu vit koma á mál.

Á BitStovuni verða kveikjandi fyrilestrar um støðuna í Føroyum og um hvussu mann hevur loyst uppgávuna í Norra. Aftaná verður arbeitt í BitStovum. Hvør BitStova arbeiðir við sínum evni og kemur við einari gerðarætlan (Roadmap) fyri sítt evni. Dagurin endar við framløgum frá BitStovunum, niðurstøðu og kjaki.

Málbólkurin eru teir stovnar og tey virkir, sum kunnu hugsast at lata upplýsingar til og/ella at verða brúkarar av einari komandi Felags Virkisskrá. Luttakararnir verða serliga innboðin.

BitStovan verður mánadagin 7. juni 2004 á Hotell Føroyum. Meira kann lesast um BitStovuna á www.bitland.fo.



*Henrik Old roynir seg sum fjølmiðlamaður til tíðindafund um støðuna á Fornminnissavninum. Hvussu hann og hini fimm kláraðu seg, ber til at síggja í politisku Dag og Viku sendingini komandi mikukvøld*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Tingfólk hinu megin mikrofonina

**Í sambandi við 20 ára føðingardagin hjá Sjónvarpi Føroya verður ein heldur øðrvísi Dagur og Vika á skránni komandi mikukvøld, har tingfólk fara at gera sendingina**

HÁTÍÐARHALD
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Johnsigurd Johannesen verður útskiftur við Jørgen Niclasen. Og hini á liðinum, sum vanliga gera innsløg til tíðindasendingina hjá Sjónvarpinum verða Annita á Fríðriksmørk, Henrik Old, Kári P. Højgaard, Kaj Leo Johannesen og Bill Justinussen.

– Endamálið við hesari sendingini, umframt tað hyggjaravinarliga í tí, er at geva politikarunum eina mynd av, hvussu vit arbeiða í tí dagliga, greiðir Katrin Petersen frá.

Umframt hesa politisku Degi og Viku verða eisini tríggjar kjaksendingar á skránni mána, týs og mikukvøldið í komandi viku, har kjakast verður í trimum førum um ávíkavist byrjanina hjá Sjónvarpinum, dagsins støða á stovninum og so framtíðarútlitini hjá Sjónvarpi Føroya.

### Dagur í viku

Mikudagurin var sostatt dagur í viku hjá hesum seks tingfólkunum, sum tá sluppu at royna seg sum fjølmiðlafólk.

Tey møttu til arbeiðis til redaktiónsfund mikumorgunin, har tosað varð um, hvat fyri søgur hvør skuldi taka sær av. Bjørt Samuelsen var redaktørur hjá teimum, og saman býttu tey uppgávurnar út til tey seks. Og so var bara at fara í gongd.

Eitt nú skuldi Henrik Old til tíðindafund í sambandi við, at Steffen Stumman Hansen og Arne Thorsteinsson høvdu sagt seg úr starvi á Fornminnissavninum.

So nýttu tey allan dagin til at arbeiða við teirra innsløgum, og hóast sendingin ikki fór beinleiðis í luftina klokkan 20 tað kvøldið, so hevði Sjónvarpið skipað soleiðis fyri, at tey skuldu arbeiða sum um teirra evstamark var klokkan 20.

– Klokkan 20 var tað so Jørgen Niclasen, sum sat í stólinum í Dag og Viku studionum og skuldi royna seg sum vertur, sigur Katrin Petersen.

Hvussu leikur gekk hendan dagin, meðan tingfólkini royndu seg sum fjølmiðlafólk fæst at síggja komandi mikukvøld. Men eisini fer at bera til at síggja, hvussu tey kláraðu seg undir pressinum. Tí Sjónvarp Føroya hevði allatíðina eitt filmstól við, so at lúrast kann handan myndatólið og veruliga síggja, hvussu leikur gekk.

– Tað er uttan iva eisini nakað, sum fólk fara halda vera stuttligt at síggja, heldur Katrin Petersen.

### Gamalt hugskot

Katrin sigur, at hetta hugskotið ikki er eitt nýtt hugskot. Hetta hava tey í sjónvarpinum fleiri ferðir tosað um, men ikki fyrr enn nú hava tey gjørt tað til veruleika.

– Vit hava ofta tosað um tað, serliga tá sjónvarpið hevur verið í brennideplinum eitt nú viðvíkjandi fíggjarligu støðuni, greiðir hon frá.

Hon vísir á, at ofta táført hevur verið fram, at Sjónvarp Føroya ikki hevur fíggjarligu orkuna til at framleiða nógv føroyskt tilfar, so hava fleiri politikkarar sagt, at tey bara kunnu gera bíligari sjónvarp.

– Hetta er ein gyltur møguleiki at vísa politikarunum, hvussu vit arbeiða í tí dagliga, og hvat tað í veruleikanum er, vit arbeiða við, sigur Katrin Petersen.

Hon heldur fram, at tað er jú ongin loyna, at tað gongur striltið við at framleiða føroyskt tilfar til allar málbólkarnar hjá sjónvarpinum. Eitt nú hevur ongin ungdómssending verið í fleiri ár.

– Men við tí avmarkaðu orkuni vit hava, so er tað bara soleiðis, at seta vit eyka kreftir inn til at framleiða til dømis tíðindi, so gongur tað út yvir møguleikarnar fyri at gera aðrar sendingar, til dømis kjaksendingar. Ella um vit gera barnasendingar ella okkurt so kundi tað lættliga gingið út yvir eina sending sum Cassiopeia, sum jú hevur fingið eina flotta byrjan, sigur Katrin og staðfestir enn einaferð, at fíggjarliga orkan hjá Sjónvarpi Føroya er alt ov lítil.

Katrin heldur, at tey við hesum eisini fáa ein møguleika at varpa ljós á nøkur viðurskifti, sum kjakast verður um í teimum trimum kjaksendingunum í komandi viku.

– Tað er upp á tíðina, at tað verður staðfest, hvat politikararnir ætla við Sjónvarpi Føroya, sigur Katrin Petersen at enda.

ítróttur

Nr. 100 • fríggjadagur • 28. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ítróttavedding skavar 9,5 milliónir saman til barna- og ungdómsarbeiði




*Torfinn Højgaard, formaðurí Ítróttarvedding, fegnast um, at tað bar til at útluta metstóru upphæddirnar. Her er tað Lív Tórgarð, forkvinna í FUR, sum fær stóra kekkin*

**Føroyingar hava serliga tikið skavispølini hjá donsku tipstænastuni til sín, og tí eru ikki færri enn 9,5 milliónir krónur nú býttar út til barna- og ungdómsarbeiði, umsitið av Ítróttasambandi Føroya, Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðnum**

ÍTRÓTTARVEDDING
*tíðindaskriv*

Samanlagt spældu føroyingar fyri góðar 30,6 milliónir krónur í fjør, og ein sera stórur partur av hesum verður verandi í landinum. Umframt at hepnir spælarar í Føroyum vunnu tilsamans einar átta milliónir krónur, koma so eisini provisiónir til føroysku sølustøðini og gjald fyri samskifti til Føroya Tele.

Aftur at hesum kundi smápartafelagið Ítróttavedding seinnapartin mikudagin eisini lata heilar 9,5 milliónir krónur til barna- og ungdómsarbeiði, soleiðis sum felagnum er álagt.

Hesir pengar verða latnir trimum móttakarum, sum eru Ítróttasamband Føroya við 5,7 milliónum krónum og Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðnum, ið fáa 1,9 milliónir krónur í part. Hesi trý eru eisini partaeigararnir í Ítróttavedding.

Serliga eru tað skavispølini hjá Dansk Tipstjeneste, ið hava sligið ígjøgnum í Føroyum, tí tey standa fyri einum góðum triðingi av samlaða umsetninginum her í 2003. Síðani spæla føroyingar eisini nógv við í Lotto og Oddset, umframt OnsdagsLotto og Joker.

Torfinn Højgaard, formaður í Ítróttavedding, fegnast um, at heilar 9,5 milliónir krónur eru at býta út eftir góða árið í fjør:

– Tá danska veddingarlógin í fjørvár varð endurskoðað, gjørdist greitt, at hon ikki longur fevndi um ítróttaveddingina í Føroyum. Tí varð nýggj avtala gjørd millum Ítróttavedding og Dansk Tipstjeneste, so føroyski ágóðin nú er tengdur at, hvussu nógv verður spælt fyri í Før-oyum, sigur Torfinn Højgaard.

– Serliga fegnast vit um, at fólk hava tikið so væl ímóti skavispølunum, sum ikki vóru at fáa hjá føroysku veddingarumboðunum fyrr enn í fjør. Hugaligt er, at hesin spælihugur kann koma barna- og ungdómsarbeiðinum til góðar.

### Fegnir móttakarar

Største »bitan av køkuni« fær Ítróttasamband Føroya, sum hesa ferð fekk 5,7 milliónir krónur. ÍSF-forsetin Heðin Mortensen sigur, at hesin peningur kemur sera væl við.

– Ja, henda upphæddin kemur á eitt sera turt stað, men vit skulu nokk fáa brúkt hetta skilagott. Vit hava ein býtislykil, ið gevur sersambondunum hvør sína upphædd, sum so víðari kunnu koma limafeløgunum kring landið til góðar, sigur Heðin Mortensen.

– Sum vanligt, fer nógv av hesum at síggjast aftur í landsliðsarbeiði og øðrum, eitt nú Oyggjaleikunum í Hetlandi næsta summar. Einki av hesum peninginum fer til umsiting, men alt til ítrótt.

Lív Tórgarð, sum júst hevur tikið við sum forkvinna í Føroya Ungdómsráð, var eisini fegin um, at ein av hennara fyrstu uppgávum í starvinum var at taka ímóti einum kekki upp á 1,9 milliónir krónur.

– Vit hava eina reglugerð, ið limafeløgini skulu ganga eftir, tá tey søkja um at fáa burtur av hesum peninginum, ið bæði kemur teimum limafeløgunum, lokalfeløgunum og serligum og øðrvísi tiltøkum til góðar, sigur Lív Tórgarð.

– Feløgini eru ófør at søkja, so hvørt oyra fer til barna- og ungdómsarbeiði hjá okkara limum. Eisini stimbrar hetta undir feløgini at mennast, tí bæði limatal og virksemi hava ávirkan á, hvussu nógv tey kunnu fáa í sín part.

Triði partaeigarin, ið eisini fær 1,9 milliónir krónur frá Ítróttavedding, er Mentamálaráðið. Jóan Petur Hentze, fulltrúi, sigur tað vera nógv, tey kunnu brúka peningin til.

– Okkara partur fer til tað, ið ikki kemur undir virksemið hjá Ítróttasambandi Føroya og Føroya Ungdómsráð, og serliga leggja vit dent á at lata barna- og ungdómsmentanarligt arbeiði fáa. Tað kann vera alt frá familjukonsertum yvir barnadans til tiltakið Ung í Føroyum, sigur Jóan Petur Hentze.

– Eftirsum upphæddin hesa ferð er nakað størri, enn hon hevur verið hini árini, fara vit nokk at eftirlýsa onkrari størri verkætlan, ið vit kunnu stuðla við einari munandi upphædd. Upphæddin er so mikið stór, at hon veruliga kann gera góðan mun, har hon verður brúkt.

### SvF sendir Hollandsdystin

Sjónvarpið hevur í tíðindaskrivi boðað frá, at tað hevur eydnast stovninum at fáa rættindi til at senda beinleiðis frá landsdystinum hjá føroyska landsliðnum, sum verður í Sveis týsdagin.

Dysturin byrjar kl. 19.15, og í steðginum verður so ein stytt Dagur og Vika sending, áðrenn farið verður beinleiðis til seinna hálvleik.

**-jm**

### NM í Boccia

Í døgunum 29.og 30. mai verður Norðurlanda Meistarakapping í Boccia. Henda kapping verður hildin í Lappeenranta í Finlandi.

Føroyar fara at luttaka við fýra spælarum: Áki Joensen fer at spæla í einstaklingakapping í bólkinum Koyristólur við rennu. Jógvan Telling Joensen, Marius Johansen og Jóannes Ziska fara at spæla bæði í einstaklinga kapping og liðkapping í bólkinum fyri standandi.

Eitt brutto landslið hevur vant síðan í januar, og vórðu hesir spælarar úttiknir eftir FM, sum var seinast í mars mánaða. Teir hava vant dúgliga síðan, so teir eru væl fyrireikaðir til kappingarnar.

### Porto vann

Tað eydnaðist Port at vinna Champions League kappingina í ár. Hetta hendi, tá teir mikukvøldið vunnu 3-0 á Monaco, eftir at støðan í hálvleikinum var 2-0. Jorge Nuno Valento, Gomes Carlos Alberto og Paulo Jorge Costa skutu mállini hjá Porto.

**-jm**